# Familjudagur í Hoydølum



FAMILJUDAGUR
*2. a í Hoydølum*

Sunnudagin 16. mars skipar 2. a í Hoydølum fyri familjudegi. Tiltakið hevur áður verið skipað av øðrum flokkum, og undirtøkan hevur verið sera góð.

Fólki dámar væl at koma ein túr oman í Hoydalar at síggja og royna tey ymsu tiltøkini, ið skipa verða fyri, og serliga um ein sjálvur hevur gingið í skúlanum í Hoydølum, sum ungur, er tað stuttligt at uppliva skúlan aftur og á ein øðrvísi hátt.

Tiltakið verður sum sagt í Hoydølum sunnudagin 16. mars klokkan 14.30-19.00, og høvi verður at: fáa bilin vaskaðan, keypa kaka og bollar, ríða á rossabaki, kasta bóltar eftir málskivu, spæla sær í vælumtóktu hoppiborgini, berjast í stórum sumo-draktum, eins og teir veruligi sumo-wrestlarirnir, ið vit síggja í sjónvarpsrásini, Euro Sport, keypa góðar og bíligar lutir á loppumarknaði, fiska í fiskibrunni, eins og á Ólavsøku og so vitjar ein sera fittur klovnur, sum ger balón-djór til øll børnini, ið eru áhugaði.

Um veðrið er til vildar, verða flestu av tiltøkunum uttandura, men um ikki, verða tey inni.

Ágóðin fer til námsferð hjá 2.A í Hoydølum, sum skal til Lissabon í apríl í ár.

Um tit hava hug at royna eitt av niðanfyri nevndu ella bert hava hug á einum góðum familjudegi, so er bara at koma oman í Hoydalar sunnudagin 16 mars millum klokkan 14.30-19.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin.


## Master útbúgving í leiðslu og fyrisiting

BP/Shell hava gjørt av aftur at stuðla einari Master útbúgving í samstarvi við Robert Gordon Universitetið í Aberdeen og Føroya Handilsskúla. Útbúgvingin verður skipað sum parttíðarundirvísing og fjarlestur. Tann lesandi kann nema sær eina fullfíggjaða Master útbúgving, sama hvar hann býr. Sostatt hava fólk í útjaðaraøkjunum somu møguleikar at luttaka, sum tey, ið búgva í miðstaðarøkinum.

Tá ið útbúgvingin byrjar, verður skipað fyri felags kunningardegi. Tá ið hvør lærugrein byrjar, verður undirvíst í Føroyum í tveir dagar. Undirvísingin fer síðani partvíst fram um internetið og partvíst sum fjarlestur.

Útbúgvingin er býtt upp í trý eitt árs skeið. Hvørt árið gevur endaligt prógv, og er tað upp til tann lesandi, um hann heldur áfram øll trý árini.

| | Lærugreinir: | Heiti, eftir lokna próvtøku: |
|---|---|---|
| 1. árið: | The Business Environment, Managing People, Finance for Managers, Marketing | *-Post Graduate Certificate* |
| 2. árið: | Human Resource Management, Planning and Decision Making Economics of Business, eBusiness Systems | *-Post Graduate Diploma* |
| 3. árið: | Høvuðsritgerð | *-Master Degree* |

Umsøkjarin skal hava lisið í trý ár á universiteti ella líknandi hægri lestrarstovni.

Útbúgving sum fólkaskúlalærari, skipsførari, maskinmeistari og frá hægri handilsskúla o.l. útbúgvingar, kunnu eisini geva atgongd til upptøku. Eisini kunnu drúgvar førleikagevandi arbeiðsroyndir geva rætt til upptøku.

Kunnandi fundur verður fríggjadagin 21. mars 2003 kl. 17:00, á Føroya Handilsskúla í Havn. Umboð frá Robert Gordon Universitetinum í Aberdeen luttaka.

Umsóknarfreistin er týsdagin 25. mars 2003. Umsóknarbløð fáast við at venda sær til Føroya Handilsskúla. Sí annars www.fh.fo

Útbúgvingin byrjar 25. apríl 2003 kl. 10:00

Áhugað eru vælkomin at seta seg í samband við Føroya Handilsskúla á tel 317177 ella við telduposti: en@hsh.fo, at frætta nærri um útbúgvingina.

THE ROBERT GORDON UNIVERSITY ABERDEEN

FØROYA HANDILSSKÚLI

bp



## Ársaðalfundur

**Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Føroya Banka**

**mikudagin 26. mars 2003 kl. 17.00**

á Hotel Føroyum, Tórshavn, við hesi dagsskrá:

1. Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í farna ári.
2. Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar og ársfrágreiðing.
3. Avgerð um nýtslu av avlopi samhært góðkenda ársroknskapin
4. Uppskot til viðtøkubroytingar.

   *Nevndin setir fram uppskot um broyting av §10, stk. 2, í viðtøkum bankans, soleiðis at talið av nevndarlimum, valdir á aðalfundi, verður ásett til 4, og soleiðis at valskeiðið hjá nevndarlimunum verður ásett til 3 ár.*

5. Val av nevndarlimum.

   *Jákup Jacobsen fer frá, tí skeiðið er runnið.*

   *Nevndin mælir til, at valskeiðið fyri hinar nevndarlimirnar, valdir á aðalfundi (3), við gildi beinanvegin verður longt til 3 ár roknað frá tí, at limurin kom í nevndina.*

6. Val av grannskoðarum.
7. Uppskot frá nevndini

   *Nevndin fær heimild til innan endan av mars 2004 at lata bankan ognast upp til 1 pst. av partapeningi bankans fyri ein kurs, sum ikki kann víkja frá seinasta almannakunngjørda innara virðinum við meira enn 10 pst.*

8. Ymiskt.

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin eins og uppskot til viðtøkubroytingar liggja frammi á skrivstovu bankans í Húsagøtu 3 í Tórshavn.

Atgongumerki til aðalfundin verða útflýggjað á deildum bankans í seinasta lagi fríggjadagin tann 21. mars 2003.

Tórshavn, tann 28. februar 2003.

NEVNDIN

FØROYA BANKI






*Hjørdis Johansen fekk sjónleikavirðisløнina Herðaklappið, sum Leikpallur Føroya letur, í ár*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Hjørdis Johansen ársins herðaklapp

**Ársins herðaklapp, sum Leikpallur Føroya letur, varð í ár latin Hjørdis Johansen fyri hennara pedagogiska og leiklistarliga avrik, sum kveikjandi íbirtari fyri børn og ung – leiklistini í Føroyum at frama**

HERÐAKLAPP
*Solby A. Eliasen*

Hjørdis Johansen fekk ársins herðaklapp handað á Grækarismessu. Laura Joensen, formaður í Leikpalli Føroya handaði Hjørdis herðaklappið.

Í sínum grundgevingum sigur nevndin fyri Leikpalli Føroya millum annað, at Hjørdis hevur við Dramaverkstaðnum ósjálvsøkin og áhaldandi arbeitt fyri at veita næmingunum frálæru og innlit í alt tað kreativa og vitanarliga, sum hevur við leiklist at gera. Hon hevur givið næmingunum møguleika til at royna seg út frá sjónarmiðinum, at øll leiklistaáhugað skulu hava ein kjans, tá tey eru til reiðar til tess.

– Hjørdis Johansen hevur lært næmingarnar at taka sjónleik í álvara bæði í framførslu á palli og sum góðir áskoðarar, eins og lært tey at duga at taka í móti atfinningum frá øðrum, verður eisini sagt í grundgevingunum.

Hjørdis Johansen er pedagogur og dramalærari. Hon undirvísir einsamøll á Dramaverkstaðnum, sum hon sjálv stovnaði í 1997. Hon er 52 ára gomul og umframt at hava starvast sum pedagogur á stovnum, so hevur hon virkað sum sjónleikari gjøgnum nógv ár. Og harvið hevur hon ognað sær holla vitan um leiklist og leikstjórn, serliga í Íslandi, men eisini í Noreg og Danmark.

Ætlanin við Dramaverkstaðnum er at undirvísa í sjónleiki, men ikki bert at seta leikir upp og læra næmingarnar at framføra. Tað er meira at taka saman um alt, sum hevur við sjónleik at gera. Eini 70 – 80 næmingar ganga á Dramaverkstaðnum.

Annað forvitnisligt arbeiði á Dramaverkstaðnum er millum annað at tilevna sjónleikir, sum verða tiknir úr nútíðar gerandisdegnum ella gomlum sagnum.

Í fjør varð ársins herðaklapp latið Hans Tórgarð.

# Ból og Biti til ferðafólk

**Kunningarstovurnar kring landið hava sent út tíðindaskriv, har heitt verður á fólk úr øllum landinum, ið hava møguleika fyri at hava Ból og Bita ella leiga eitt summarhús út, um at venda sær til kunningarstovuna í teirra øki og bjóða seg fram**

FERÐAVINNAN
*Solby A. Eliasen*

Tað hevur víst seg at vera sera trupult hjá ferðavinnuni í Føroyum at finna fólk, sum eru áhugaði í at hava Ból og Biti ella Bed & Breakfast, sum tað er betur kent. Og nú tíðin aftur nærkast, har einstaklingar og ferðavinnuskrivstovur seta seg í samband við ymsu kunningarstovurnar kring landið, er greitt, at tað er ógvuliga torført at finna fólk, sum eru áhugað í at hava Ból & Bita.

Í tíðindaskrivinum frá Kunningarstovunum verður sagt, at hetta annars er ein tann best umtókti gistingarhátturin millum ferðafólk, tí tey tá av álvara fáa eitt lítið innlit í tann vanliga føroyingin.

Somuleiðis er tørvur á summarhúsum, ið eitt nú útlendskar og føroyskar familjur kunna leiga í eitt stytri ella longri tíðarskeið.

– Havandi í huga at fleiri hús standa tóm kring alt landið, tó serligani í útjaðaraøkinum, átti tað at verið møguligt at bøtt um hetta, so at vit hava nakað at bjóða ferðafólkunum og ferðaskrivstovunum, tá hesi venda sær til okkara, verður sagt í skrivinum.

Hesin trupulleikin kemur serliga til sjóndar í summar, tá Føroyar og Týskland skulu leika EM-undandyst í fótbólti 11. juni. Henda hendingin verður skýrd at verða ein tann størsta í ferðavinnuárinum 2003. Í sambandi við dystin er tørvurin á gistingarmøguleikum ovurhonds stórur, soleiðis at tað í løtuni er ógjørligt at finna eina tøka song í landinum um tað mundið.

Frá Kunningarstovunum verður sagt, at tey vita, at føroyingum dámar væl at hava gestir, og tískil vóna tey, at so mong sum gjørligt fara at seta seg í samband við Kunningarstovuna í teirra øki. At enda verður sagt í tíðindaskrivinum, at tað verður eitt lítið ískoyti til tann privata búskapin hjá teimum áhugaðu.

# Grækarismessu hald í Klaksvík



*Grækarismessuhald verður í Klaksvík leygardagin kl. 14:30*

**Grækarismessuhald verður í Klaksvík leygardagin kl. 14:30**

GRÆKARISMESSA
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Um viðrar fer skrúðgonga frá Býráðshúsinum og heim í skúlagarðin í skúlanum við Ósánna, har Jóna Olsen, leiðari í Varda Verkstaðnum fer at flyta fram røðu. Um veðrið ikki verður til vildar, so verður haldið inni í auluni í skúlanum.

Tað er Klaksvíkar Hornorkestur, sum skipar fyri Grækarismessuhaldinum í Klaksvík, og við tí í huga, at 2003 er ár teirra brekaðu hava tey heitt á Jónu Olsen um at halda røðuna. Hornorkestrið fer sum vanligt at spæla nøkur løg, tá norðoyingar fara at bjóða tjóðfuglinum vælkomnum heim.